

*Niðanfyri skúrin í Dagmarsvík. Til vinstru er svágur pápa mín, giftur við Fine pápasystir. Pápi mín er í miðjuni og síðan Mikal mammubeiggi mín. Eitt ísstykki er komið inn í havnina. Til vinstru kemur skúrurin undan sum vit búðu í fyrsta árið*



*Renatus, grønlendingur, og pápi mín umborð á gamla Boga. Hetta er ein sunnudag vit hava verið inni á Nordafar ein túr*



*Her eru vit í ferð við at flyta. Trossarnir, gørnini, liggja á dekkinum, og skipið siglir. Maðurin fremst á myndini er skiparin*



*Hetta er íslendski báturin Stjarnan, sum eg var við. Hann var um 100 tons, og hann fiskaði til tað virki, sum vit arbeidu á*

Strævið var tað eisini, og heldur ikki kom tað stóra burtur úr hesum arbeiðsháttinum.

## Ófantalig heimferð

Hetta heystið komu vit heim við einum norskum dampara, sum æt Rask. Hetta var ein gamal bátur. Tað segðist, at hann hevði undirvatnsbátamotor. Meðan innskipað varð, lá skipið við brúnna á Nordafar. Tað var komið út í november mánað. Tá var blivið kalt og ótespuligt veður við vátaslettingi. Tað ringasta var, at eingin proviantur var eftir.

Fyri ikki at tarna arbeiðinum bleiv matgjørt á tí norska vælferðarhúsinum. Eitt kvøldi, ella meira at siga um náttina, komu vit niðan móðir og troyttir at fáa okkum at eta, eftir at vit høvdu skipað fisk inn allan dagin.

Vit fingu kókaðan fisk og smelt afturvið. Allir høvdu helst fingið sær væl uppá tallerkin og væl av smelti útyvir. Tá kom róp í, at tað var sápa og ikki smelt á tallerkinum!

Hetta komst av, at tað var jú næstan eingin proviantur eftir og heldur einki feitt. Kokkarnir høvdu so funnið nøkur blikk, sum høvdu ligið eftir frá norðmonnunum. Um eingin áskrift hevur verið á hesum góðu blikkum, ella um tað var skrivað á kinesiskum, veit eg ikki, men hetta var so smeltað og sett á borðið sum feitt.

Tað var ein øgilig gálvan og snerkjan, sum tá var á monnum. Eg minnist einki um, at nakar føldi nakra serliga trongd til at takka kokkunum aftur fyri teirra ætlaðu góðgerð!

Tá ið liðugt var at skipa inn, var farið at sigla heim, men umstøðunar umborð vóru sera ringar. Tað var lítil og eingin matur, og tað dryppaði niður allastaðni.

At eingin matur var umborð var ikki okkara skuld. Skipið var jú komið yvir eftir fólki og fiski, og skuldi sostatt havt nóg mikið av útgerð við, men so var ikki. Eg minnist ein døgurða, óskrællað sild beint úr tunnuni og eplir. Og sum vant var heldur eingin hiti.

## Harðlig útpurring og løgtingsval

Eina náttina, meðan teir flestu lógu í fasta svøvni, var eitt øðiligt skrambul. Tá var tað akkersketan, sum rann út. Hon rann út øll somul, til tað stóð á í ketukjallaranum, og ketan slitnaði við einum ordans bresti. Tað var ein harðlig útpurring. Tað hoyrdist, at stýrimaðurin fekk sekkin, tí at hann ikki hevði koyrt bremsurnar orduliga fyri.

Vit komu so heim í øllum góðum tann 13. november. Tað var løgtingsval 8. november, so vit lukkaðust ikki heim til valið.

Hetta var annars eitt val við stórum broytingum. Drúgv fiskimannaverkføll høvdu verið í tvey ár. Fyri hendingina við skalkijarninum undir verkfallinum í 1954 var formaðurin í fiskimannafelagnum Erlendur Patursson dømdur at sita í 40 dagar. Hann valdi at sita, meðan valið var, og varð roknaður sum martýrur fyri fiskimenn. Hetta útvegaði hansara flokki, tjóðveldisflokkinum, so stóra framgongd, at hann fór úr tveimum upp í seks tingmenn.

Tað kann eisini verða nevnt, at grønlandsútróðurin var eitt fast evni til løgtingsval í spurninginum um loysing ella samband. Ført varð fram, at uttan ríkisfelagsskap mistu vit okkara rættindi til hendan útróður. Men so við og við datt hetta burtur sum grundgeving!

Við hetta summarið vóru umframt meg sjálvan:

Jens Kristian Petersen, Magnus Magnusen, Froðba, Mikal Tausen, Poul Rasmussen, Danial Poulsen, Martin Johannesen, Sand.

## Fingu kokk og væl var tað

Í 1955 eru vit eisini í Føroyingahavnini. Men nú vóru vit bara við einum báti, Boga. Tað var blivið so ringt at fáa fólk. Orsøkirnar vóru kanska fleiri. Hetta var einki serligt lív, og inntøkurnar vóru einki at reypa av. Vit vóru fýra manns hetta summarið, tríggir føroyingar og ein grønlendingur, sum var frá Fiskanesi.

Hetta var eisini fyrsta ári, vit høvdu ein fastan kokk, eina kvinnu. Hon var eisini úr Fiskanesi og átti ein fýra ára gamlan drong, Arne, sum hon hevði við sær.

Tað hevði víst seg ígjøgnum árini, at tað bar ikki til at hava ein fastan kokk fyri fullan part, tá ið mann var so fámentur. Tískil komu vit aftur at landi til útkaldan fýr og ongan tilgjørdan mat.

Tað var so, tá ið vit komu aftur at landi, ofta við nógvum fiski, at ein maður leyp upp úr bátinum, og kókaði ein temunn. Samstundis setti hann eina grýtu út á við einum døgurðabita. Tá ið vit so høvdu drukkið, fóru vit út aftur at rigga til at gera reint, flekja og salta fiskin. Tá ið kókað var, so var farið at fáa sær eta, aftaná var farið at flekja. Her bleiv staðið til liðugt var, ofta til út í móti morgni alt eftir, hvussu nógv fiskað var. Tá ið alt var komið í salt og alt var liðugt, so vit kundu tørna inn, vóru ofta nógvir tímar liðnir. Var so leygardagur dagin eftir ella man væntaði illveður út á dagin, so var frívaktin ofta stytt fyri ikki at missa ov nógv av degnum eftir. Sunnudag var altíð friður.

Nú bleiv hetta so roynt at fáa fastan kokk. Tað var ein stórur munur at koma aftur til heitan og reinan skúr og mat standandi á borðinum. Hartil vóru klæðini vaskaði.

Men tað var strævið, ógvuliga strævið. Tann, sum ikki hevur verið við til slíkt, dugir ikki at seta seg inn í tað. Men hinvegin kann sigast, at mítt ættarlið livdi í einari stórari broytingartíð til tað betra.

Við hetta summarið vóru umframt meg sjálvan:

Jens Kristian Petersen, Froðba, Mikal Tausen, Sand,

Renatus, Grátufjørðurin, Marta Stefani, (kokkur), Fiskanes.

## Fóru at royna Ísland

Í 1956 var ikki farið til útróður í Grønlandi. Hesa tíðina vóru so nógvir føroyingar farnir at leita sær til Íslands. Skipaflotin var í ringum standi, og tí vóru inntøkumøguleikarnir hjá fiskimonnum vánaligir. Íslendingar høvdu nógv góð skip, sum teir høvdu trupult at manna. Sigast kann, at Ísland gjørdist bjargingin hjá føroyskum fiskimonnum hesi árini. Teir vóru fleiri enn 1.000 mans og eisini kvinnur, sum fóru til Íslands stóran part av fimmtiárunum. Seinnapartin av fimmtiárunum byrjaði endurnýggingin av føroyska fiskiflotanum av álvara, tá kundu føroyingar koma heim aftur.

Pápi mín og eg avgjørdu, at vit skuldu royna at fara yvir til Íslands um várið at vita, um vit kundu fáa nakað burtur úr vártíðini har uppi.

Heima í Føroyum var so einki at vinna. Vit fóru so upp til Reykjavíkar við ferðamannaskipinum Dronning Alexandrine hjá DFDS. Har vóru nógvir føroyingar við.

Nógvir av hesum monnunum vóru teir somu, sum vóru í Grønlandi um sumrini. Tað hevur verið tíðliga í februar mánað, at vit komu til Reykjavíkar.

Eg hevði ikki fingið kjans, áðrenn vit fóru heimani frá. Hetta var tað vanliga tá. Fatanin var, at tað var bara at fara yvir, so fekst okkurt at gera.

Vit fingu pláss á hotellinum hjá Frelsunarherinum í miðbýnum í Reykjavík, har tað var bíligt at búgva. Her búðu fleiri skopuningar. Vit vóru so har í nakrar dagar. Tað tyktist at vera nakað langligt at ganga og mala, so ein var byrjaður at ivast í, um nakað fór at spyrjast burtur úr. Men so kom onkur at sóknast eftir fólki, og tað var til eitt flakavirki á